# 167 menn og 73 kvinnur deyð í ferðsluni




*Føroyakort á Politistøðini í Havn: Reyðu brikkarnir vísa, hvar ferðsluvanlukkur hava verið, sum hava kravt mannalív. Tilsamans eru 240 fólk deyð í ferðsluni í Føroyum síðani fyrsta vanlukkuna, sum kravdi mannalív. Hon hendi á Varmakeldueiði 2. september í 1928.*

**Talið av teimum deyðu í ferðsluni í Føroyum er á leið líka stórt, sum talið av borgarum í Hósvíkar kommunu. Fyrsta vanlukkan sum kravdi mannalív var í 1928**

FERÐSLUDEYÐI
*Eirikur Lindenskov*

Fyrsta ferðsluvanlukkan, ið kravdi mannalív í Føroyum, hendi á vegastrekkinum við Varmakeldueiði beint eftir midnátt tann 2. september í 1928. Ein lastbilur við trimum monnum fór út av vegnum, og førarin doyði.

Síðani hesa vanlukkuna, eru 239 onnur fólk deyð í ferðsluni í Føroyum. Tilsamans 73 kvinnur og 167 menn – ella áleið tað sama, sum íbúgvatalið í Hósvík.

Sum Jan Fossaberg, fersðlupolitistur í Havn, nevndi í blaðnum í gjár, so er tað ferðin, sum er størsta orsøkin til hesa vanlukkur. Ofta er eisini brennivín uppi í – ikki bara onkuntíð, men rættuliga ofta.

Hyggja vit í hagtølini, so vóru lutvíst nógvar ferðsluvanlukkur í gomlum døgum.

Longu í 1931 hendir næsta ferðsluvanlukkan, ið krevur mannalív, og ein aftur í 1939.

Undir seinna heimsbardaga doyggja fimm fólk í ferðsluni. Síðani henda ferðsluvanlukkur, við deyða sum fylgju, á nærum hvørjum ári, okkurt árið ein, okkurt árið fimm og okkurt hendinga árið sleppa vit undan at missa fólk í ferðsluni.

Tá vit koma upp í sjeytiárini fara vanlukkurnar rættuliga at taka dik á seg, og í 1971 doyggja sjey fólk í ferðsluni.

Í 1974 er talið tvífaldað í mun til 1971, tí tá doyggja 14 fólk. Fleiri dømi eru um vanlukkur, sum krevja trý mannalív, og í nógvum førum eru vanlukkur, sum krevja tvey mannalív.

Í áttatiárunum doyggja nógv fólk í ferðsluni, tilsamans 86 fólk. 14 í 1986, 12 í 1987 og 10 í 1988.

Nógv varð tosað um hesi viðurskifti tá, ein avleiðing er lógin um trygdarselar og páboðið um nýtslu av teimum, eins og at løgtingið samtykkir eina sera stranga lóg um ferða-hámark, har tú missir koyrikortið, um tú koyrir meira enn 30 km/t yvir hægst loyvdu ferð.

Hesi tiltøk síggjast aftur í hagtølunum, tí síðani 1988 hava tølini verið eitt-sifrrað – størsta talið hevur verið sjey fólk um árið.

Í 1989, 1990, 1993, 1997 og í 1999 eru sjey fólk deyð í ferðsluni um árið. Bestu árini í so máta vóru í 1992 og 1998, tá »bert« eitt fólk doyði í ferðsluni. Vit skulu annars heilt aftur til 1970 fyri at finna eitt ár, har »bert« eitt fólk er farið í ferðsluni. Til samanberingar kann nevnast, at í 1970 vóru skrásett 3.369 akør í Føroyum. Í 1992 var talið 17.044 og í 1998 17.819. Í 2001 vóru skrásett 20.976 akfør í Føroyum.

Hyggja vit eftir hjá standandi korti, so síggja vit, hvar ferðsluvanlukkurnar eru hendar. Reyðu brikkarnir vísa á staðið, har vanlukkur eru hendar, sum hava kravt mannalív.

Í Havn og i Klaksvík eru nógvar vanlukkur hendar, sum hava kravt mannalív, men hyggja vit eftir landsvegunum, so eru nógv farin á Oyggjarvegnum og rættuliga nógv á strekkinum úr Kollafirði norður gjøgnum Sundalagið, eins og rættuliga nógv eru deyð á Skálafjørðinum.

Vit kunnu sjálvandi seta spurningin, um tað er vegnum, galið er við... Men svarið er kortini næstan altið:

– Ov nógv ferð og brennivín.

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í fleiri ár tosað um ein langtíðar ferðslutrygdarpolitikk, og skjýtur ráðið upp, at svenska null-hugsjónin verður brúkt sum grundarlag. Grundhugsjónin er, at eingin skal lata lív ella fáa álvarsliga skaða í ferðsluni. Hetta er sjálvandi høgt mál at seta sær, men er tað óhugsandi? Ella skulu vit góðtaka hesa stóra fólkaheilshóttan, sum ferðsludeyðin er?




*Talvan vísir okkum, hvussu nógv fólk eru deyð í ferðsluni í Føroyum. Tilsamans eru 240 fólk deyð, 73 kvinnur og 167 menn*



# Fyrst bilurin, síðani fólkið



*- Tað snýr seg fyrst av øllum um bilin og at koma til og frá so skjótt, sum til ber. Tey, sum ferðast til gongu og á súkklu, koma í aðru røð, sigur Jón Kragesteen*

**- Vilja vit tryggja okkum, at bilarnir ikki koyra skjótari, enn vit ætla, til dømis 30 km/t í einum øki millum hús, so mugu vit laga tær fysisku umstøðurnar soleiðis, at tað rætt og slætt ikki ber til at koyra skjótari enn tað sama, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

FERÐSLA
*Turið Kjølbro*

Í Føroyum hevur ikki verið hugsað um tey fyrst og fremst, sum ferðast til gongu og á súkklu, tá ið vegir hava verið gjørdir.
- Tað snýr seg fyrst av øllum um bilin og at koma til og frá so skjótt, sum til ber. Tey, sum ferðast til gongu og á súkklu, koma í aðru røð. Vegirnir verða gjørdir soleiðis, at tað er lætt at koyra skjótt. Best er tí at gera tað avmarkandi á sjálvum veganetinum at koyra skjótt, sigur Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Ferðkanningartólini, sonevndu "ferðgáarnir" í Vágunum, sum Landsverkfrøðingurin hevur sett upp, avmarka uttan iva ferðina, í øllum førum í byrjanini og serliga hjá teimum, sum vilja halda lógina, og eru glað um at fáa eina áminning um tey nú skuldu koyrt ov skjótt.

- Men eg havi onga vitan um, hvussu stóra ávirkan teir hava í longdini og heldur ikki, hvørja ávirkan, teir hava á tey, sum ikki hava so góðan hug at halda seg innan fyri ferðmarkið. Í øllum førum skulu vit vara okkum fyri at halda, at eitt tal á eini ljóstalvu tryggjar, at allir bilar halda hámarksferðina av hesi orsøk. Hetta eiga m.a. foreldur, sum eiga børn, ið spæla slíkum øki at hugsa um. Tí, vilja vit tryggja okkum, at bilarnir ikki koyra skjótari, enn vit ætla, til dømis 30 km/t í einum øki millum hús, so mugu vit laga tær fysisku umstøðurnar soleiðis, at tað rætt og slætt ikki ber til at koyra skjótari enn tað sama, sigur Jón Kragesteen.

Ferðkanningartólini kunnu ikki beinleiðis samanberast við fotofellurnar, sum londini rundanum okkum fyriskipa.

- Hesar hava víst seg at vera ógvuliga munadyggar, men her er eisini tann munur, at her lært tú ikki bara eina áminning á eini ljóstalvu, tú fært frá løgregluni sendandi eina mynd av tær og bilinum, sum sýnir, nær tú framdi lógarbrotið, hvussu skjótt tú koyrdi, tú skalt gjalda sekt og annað.

Viðvíkjandi hátøkniligum eftirliti kann verða nevnt, at tað í løtuni verða gjørdar kanningar í grannalondum okkara við ymiskum skipanum, millum annað einari sum við GPS-tøkni skrásetir, hvar akfarið er. Á einum elektroniskum korti er so tilskilað, hvat ferðmark er í hvørjum øki sær. Signal verða so send til eitt tól í bilinum, sum ger, at spitarin verður trekur, um farið verður upp um ferðmarkið. Hesa skipan royndu teir 84 føroyingarnir, sum í fjør heyst vóru á einari ferð í býnum Trollhättan í Svøríki, og teir lótu væl at.

Fyri tveimum árum síðani varð lógin viðvíkjandi hámarksferðini broytt soleiðis, at koyrir tú 30 km/t skjótari enn mest loyvdu ferð, missir tú ikki koyrikortið beinanvegin, men skalt ístaðin upp til nýggja koyriroynd og fært treytaðan dóm í trý at missa koyrikortið. Ráðið fyri Ferðslutrygd hevði fyrivarni við hesi broyting, men Jón Kragesteen ásannar nú, at fyribils hagtølini vísa, at talið av ferðsluóhappum er ikki broytt nakað serligt, og heldur ikki talið á teimum, sum hava fingið skaða í ferðsluni. Hinvegin skal eisini verða sagt, at støðan heldur ikki er batnað nakað. Tó so, talið á teimum, sum eru deyð tykist ganga niðureftir. - Men hesi tøl eru so smá, at hagtalsliga ber illa til at bara at hyggja eftir einum ella tveimum árum í senn. Henda tvær vanlukkur, sum tann eina, ið hendi á Lambareiði í fjør, broytast hagtøl okkara so nógv, at vit als ikki longur eru í sama bólki, sum hini Norðurlondini. Samanumtikið rokni eg við, at miðalferðin er hækkað síðani lógarbroytingina. Men heilt vist kann eg ikki siga tað, tí vit hava enn ikki fingið hagtølini um hetta, sigur Jón Kragesteen.

# Nullhugsjónin eitt virðiligt mál at seta

**- Ferðslutrygdarpolitikkur hevur ikki verið nóg høgt raðfestur í Føroyum. Vit eiga at hava samsvarandi ferðslupolitikk sum okkara grannalond hava. Seta vit nullhugsjónina í verk, skulu vit verða greið yvir, at hon setir krøv til politiska myndugleikan, sum má verða fúsur til at seta neyðugu játtanirnar av, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum um stutta tíð fer undir at orða ein ferðslutrygdarpolitikk**

FERÐSLA
*Turið Kjølbro*



*Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, harmast um, at arbeiðið at gera ein nýggjan ferðslutrygdarpolitikk ikki er byrjað enn*

Arbeiðið at orða ein føroyskan ferðslupolitikk, sum undanfarna landsstýrið samtykti fyri trimum árum síðani, er ikki farið í gongd enn. Orsøkin er sum skilst vantandi starvsfólk í Vinnumálaráðnum. Hetta er eisini orsøkin til, at arbeiðið at gera nýggja ferðslulóg heldur ikki er byrjað. So skjótt sum eitt ósett fulltrúarstarv er sett í Vinnumálaráðnum, verður farið undir uppgávurnar.

- Arbeiðið at gera eina nýggja koyrikortskunngerð er komið væl áleiðis og hon hevur við sær, at broytingar mugu gerast í verandi ferðslulóg. Hesar verða orðaðar nú. Nýggja kunngerðin tekur væl størri atlit til ferðslutrygd enn tann undanfarna, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Ferðslulógin, sum varð endurskoðað fyri tveimum árum síðani, tekur ikki til fulnar atlit til nullhugsjónina, sum ferðslulógir í øðrum londum gera, hóast hon er eitt stórt framstig.

- Tað er rætt, at ferðslutrygdarpolitikkur ikki hevur verið nóg høgt raðfestur. Vit eiga at hava samsvarandi ferðslupolitikk sum okkara grannalond hava. Nullhugsjónin er avgjørt eitt virðiligt mál at seta og komandi føroyski ferðslupolitikkurin fer at taka støði í hesi hugsjónini. Hvussu man velur at kalla endamálsorðingina, kann kjakast um, bert málið er tað sama: støðugt at økja um ferðslutrygdina. Men seta vit nullhugsjónina í verk, skulu vit verða greið yvir, at hon setir nøkur krøv til politiska myndugleikan, sum má verða fúsur til at seta neyðugu játtanirnar av.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur júst verið á samferðsluráðharrafundi í Lofoten. Sambært upplýsingum haðani er støðan tann, at í londunum, sum hava tikið nullhugsjónina til sín, er talið á deyðum og skøddum bert lækkað í Danmark.

- Hóast greiðan og góðan málsetning, so er tað ikki vist, at setningurin verður náddur soleiðis, sum ætlað. Men kortini eiga vit at hava ein slíkan til grund, hvørja ferð eitt hvørt verður gjørt í ferðsluni, sigur Bjarni Djurholm.

Ferðslutrygdin í Føroyum er lutfalsliga betrað samsvarandi við gongdina í grannalondunum, vísir hann á.

- Um hugt verður at talinum á deyðum og skøddum í ferðsluni sæst, at ferðslutrygdin í Føroyum støðugt er batnað seinastu 15 árini - tíbetur. Hetta er hent uttan orðaður hevur verið yvirordnaður endamálsetningur, sigur Bjarni Djurholm, sum leggur afturat, at vit kunnu takka Ráðnum fyri Ferðslutrygd fyri gongdina rætta vegin.

- Orsøkin til bøttu trygdina er eisini betri umhugsni, tá nýggir vegir eru gjørdir, ábøtur eru gjørdar á verandi vegakervi, bilverjur settar upp og annað. Bilarnir eru eisini meira ferðslutryggir. Kanska er hugburðurin millum koyrandi vorðin meira tilvitandi viðvíkjandi trygdini og ikki minst eigur Ráðið fyri Ferðslutrygd sín stóra leiklut í gongdini farnu árini.

Á landsstýrisfundi beint eftir ólavsøku fer landsstýrismaðurin í vinnumálum at umrøða spurningin um ein ferðslutrygdarpolitikk. Upprit verður lagt fyri hini landsstýrisfólkini. Málsetningurin í uppritinum verður, at eingin skal doyggja í ferðsluni. Væntandi fær landsstýrismaðurin stuðul frá hinum í landsstýrinum at fara í holt við at gera ein ferðslupolitikk í samsvari við nullhugsjónina og rikna ferðslupolitikk í grannalondunum, umframt tilsøgn at gera íløgur sambært honum. Um somu tíð situr Ráðið fyri Ferðslutrygd og arbeiðir við at orða eitt uppskot til ein komandi ferðslupolitikk.

- Eitt og hvørt ískoyti til at orða ein føroyskan ferðslupolitikk, er kærkomið, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.